Sandoyar Sýslu Ferðalag · 210 Sandur

# Leiðari til Sandoyar Kunningarstovu

Søkt verður eftri leiðara til Sandoyar Kunningarstovu at byrja sum skjótast ella eftir avtalu. Arbeiðstíðin er ¾ tíð.

**Til starvið krevst:**

- Góður teldukunnleiki
- Góður kunnleiki til føroyskt og enskt mál, bæði í skrift og í talu
- Góð samstarvsevni, tí nógv samstarv er við aðrar kunningarstovur, Ferðarráð Føroya, kommunur og veitarar
- at duga at arbeiða sjálvstøðugt

Leiðarin er eisini skrivari hjá økisferðavinnufelagnum.

Ferðavinnan í Sandoyar Sýslu er í vøkstri, og er starvið ein spennandi avbjóðing hjá umsøkjara at verða við til at mynda menningina innan økið.

Løn verður veitt sambart avtalu.

Umsókn saman við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til:

**Sandoyar Kunningarstovu, 210 Sandur**

innan 1. januar 2007.

Tey, ið vilja vita meira um starvið, kunnu venda sær til Lauru Joensen. Tlf. 210549.

---

**Mentamálaráðið**
MENTAMÁLADEILDIN

## STUÐUL TIL YRKISLEIKLIST

**Møguleiki er at søkja um stuðul til yrkisleiklist.**

Umsóknarblað og vegleiðing kunnu heintast á heimasíðu Mentamálaráðsins: www.mmr.fo undir „Mentan“ – „Oyðubløð“, ella við at venda sær til Mentamálaráðið.

Freistin at søkja um stuðul er 2. januar 2007.

Viðvíkjandi treytum og møguleikum fyri stuðli verður víst til løgtingslóg nr. 68 frá 2. mai 2003 um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m., og kunngerð nr. 18 frá 19. apríl 2004 um stuðul til leiklist v.m.

**Umsóknir skulu stílast:**
Mentamálaráðið
Postrúm 3279
110 Tórshavn

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt fyrisitur ráðið uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

sansir.fo

---

Lesið Sosialin - so eru tit við

---

# Størv á Landssjúkrahúsinum

## Deildarleiðari til B7 (endurlýsing)

Sum ein liður í umleggingunum og umvælingum á medisinska deplinum á Landssjúkrahúsinum, letur B7 uppaftur í nýggjum hami eftir ætlan 1. mai 2007. Tí søkja vit eftir deildarleiðara, til at røkja hetta starv til setan 1. februar 2007 ella eftir avtalu, á starvsbrøki 1,0.

B7 er liðugt umvæld uml. 1. februar. Tá letur B6 aftur til umvælingar, og sjúklingar og starsvfólk á B6 verða tá flutt á B7, B8 ella E3 til uml. 1. mai 2007, tá B6 letur upp aftur. Frá uml. 1. mai verða B7 og E3 lagdar saman í nýumvældu hølunum á B7, og deildin fer tá at hava 15 seingarpláss.

B7 er ein medisinsk deild við sergreinum innan lungamedisin, nefrologi, onkologi og reumatologi. E3 er eisini ein medisinsk deild og hevur sergreinar innan uppafturvenjing av apoplexisjúklingum og sjúklingum við diss. scelerose, umframt at deildin hevur viðgjørt og røktað sjúklingar við húðasjúkum.

**Vit ynskja, at tú ert áhugað/ur í**

- at menna eina gamla deild í nýggjum hami saman við kompetentum starvsfeløgum
- at skapa eitt gott arbeiðsumhvørvi, sjúkrarøktarfakliga og tvørfakliga
- at tryggja góða upplæring til nýggj starvsfólk
- at seta í verk fakligu menningina av røktarstarvsfólkunum
- at verða við til at implementera THS

**Krøv til umsøkjarin eru**

- Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Royndir innanfyri onkrar av sergreinunum á deildini
- Góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
  Áhuga fyri leiðslu
- Kann arbeiða sjálvstøðugt, kreativt og hava visiónir
- Kunnleiki innan EPJ/THS (jorunalskipanina)

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**
At standa fyri tí dagligu leiðsluni á deildini, tryggja kvalitetin í sjúkrarøktini, starvsfólkamenning, seta mál fyri sjúkrarøktini og hava ábyrgdina av fíggjarstøðuni.
Deildarleiðarin hevur, innan sjúkrarøktarfakliga øki, tilvísing til leiðandi sjúkrarøktarfrøðingin á medisinska deplinum.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið
Starvslýsing og fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, telefon 304500 lokal 6102 ella t-post asap@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 4. januar 2007 kl. 12.00

Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.

Skrivlig umsókn við CV, autiorisatión, avrit av prógvum, skjølum o.l. skal sendast til adressuna niðast á síðuni.

### Onnur størv

**Yvirlækni á Kirurgiska deplinum**
Umsóknarfreistin er 13. desember 2006, sí meira á www.lsh.fo

**Starvsfólk til KT-skivuna á Landssjúkrahúsinum**
Umsóknarfreistin er 11. desember 2006, sí meira á www.lsh.fo

**Leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur til Skurð- og Bráðdepilin**
Umsóknarfreistin er 11. desember 2006, sí meira á www.lsh.fo








LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

Landssjúkrahúsið er meginsjúkrahús Føroya við umleið 20 serlæknaøkjum og 200 seingjaplássum. Tilsamans starvast yvir 800 fólk á Landssjúkrahúsinum og endamál okkara er at bjóða føroyingum eina góða heilsutænastu á so nógvum økjum sum gjørligt.

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn
Tel.: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo

www.lsh.fo